tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 4 | fríggjadagur 6. januar 1995 | 69. árgangur | Krónur 7,00

### ÁRNI OLAFSON UM MARKNATRÆTUNA:

# Semja ella Haag í 1995

síðurnar 14 & 15



»1995 verður árið, tá spurningurin um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland verður loystur – so ella so,« sigur Árni Olafson, formaður í samráðingarnevndini



Gitingarnar um krøvini eru nógvar. Her verður út frá gitingum og met ingum gitt, hvussu landið liggur. Prikkuta linjan er upprunaliga bretska kravið, punkteraða linjan føroyska útspælið og feita linjan núverandi miðlinja og fiskimark



# Skopuningar mist einasta haga í bygdini

Skopuningar hava savnað nógvar undirskriftir móti avgerðini hjá Jarðarráðnum um at lata ein bónda fáa allan hagan, ið hevur hoyrt til Skopunar bygd. Hagin eitur Høvdahagi, og nú hevur Jóan Petur Kjærbo hann um hendi. Skopuningar ætla sær í landsstýrið at fáa hetta broytt

síðurnar 5 & 13

## Kokkur í 25 ár:

## »Havi havt manga stuttliga løtu«



Prát við 59 ára gamla Kára Thomasen, ið hevur kokkast umborð á strandferðsluskipum í 25 ár

síða 6

## *Árni Olafson um marknaósemjuna við bretar:*

# Ein avgerð má takast í 1995

*-Vit kunnu ikki halda fram við at seigpína hvør annan. Ein avgerð má takast í marknatrætuni í hesum árinum. Antin røkka vit eini semju ella má málið fara til altjóða dómstólin í Haag sigur leiðarin í føroysku samráðingarnevndini, Árni Olafson í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin - nú ein mánað undan næsta samráðingarumfarinum*

-1995 má vera árið, tá spurningurin um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland verður avkláraður. Tvs. at vit antin koma til eina semju ella mugu staðfesta, at vit mugu fara víðari til ein triðja part við málinum.

Hetta sigur leiðarin í føroysk-donsku samráðingarnevndini, Árni Olafson við Tíðindablaðið Sosialin.

Hann heldur, at tað nú hava verið so mikið nógvir fundir partanna millum, at tað ber ikki til longur at halda fram við at seigpína hvør annan.

**Um at kóka yvir**

-Tað er eitt mark fyri, hvussu nógvar fundir tú kanst halda og kortini kunna halda pottinum á kóki - tí annin kókar yvir ella missir hann kókið sigur Árni Olafson, sum nú bíðar eftir at fáa fundarboð frá bretska samráðingarleiðaranum, David Anderson.

Tað eru nevniliga bretar, sum eiga útspælið nú. Á seinasta fundinum í november, sum varð hildin í London, fekk marknatrætan heldur bráddliga vend. Tað var tá føroysk-danska sendinevndin legði eitt ítøkiligt uppskot til loysn á borðið.

**Fleiri útgávur av miðlinju**

Tað er líkið út, at hetta uppskotið snýr seg um at áseta eitt undirgrundarmark, sum er nakað innan fyri tí miðlinjumarki, sum føroyingar annars hava hildið fast um.

Árni Olafson, sum ger vart við, at hann ikki ætlar sær at føra samráðingarnar við bretar gjøgnum fjølmiðlarnar, váttar tó, at teir eru komnir við einum slíkum útspæli.

-Samráðingarnar vóru tá komnar hartil, at tað var neyðugt at koma við einum føroyskum útspæli sigur hann og ger vart við, at tá tosað verður um miðlinjumark, so eru tað fleiri útgávur av einum slíkum.

-Tann vit hava hildið uppá frá byrjan er ein av teimum "versiónunum" - útgávunum - sum er til mest gagn fyri Føroyar, sjálvandi. Men tað finnast eisini aðrar versiónir, uttan at ein kann siga, at ein er gingin burtur frá miðlinjuni.

Árni Olafson sigur, at tað á seinasta fundi varð avtalað at halda fund aftur í februar.

-Eg haldi, at bretar skulu hava ta neyðugu tíðina til at umhugsa okkara tilboð og harvið hava møguleika at endurskoða støðuna.

Eftir tí sum Sosialurin hevur skilt, so liggur tann linjan, sum føroyingar hava skotið upp ikki so langt frá tí miðlinju, sum vit annars hava hildið okkum til.

Sigast kann annars, at tað vóru bretar, sum fyri nøkrum árum síðani komu við kravinum um at áseta undirgrundarmarkið langt inni á føroyska landgrunninum. Hetta vildi føroysk-danska sendinevndin ikki hoyra talan um og gjørdi bretum vart við tað.

Síðani hevur verið fundur eftir fund, har føroyingar hava hildið fast um sítt og bretar framhaldandi hava



*Árni Olafson letur skjáttuna aftur eftir lokna oljuráðstevnu í Havn. Við lið hansara eitt av fremstu umboðunum úr norska oljuvinnuni, sum m.a. kom við góðum ráðum um, hvussu føroyingar áttu at loysa marknatrætuna við bretar. Mynd jan*

➤




*Nógv verður gitt um, hvat krøv og uppskot til undirgrundarmark liggur. Vit hava útfrá metingum og gitingum gjørt eina roynd at strika upp upprunaligu bretska kravið (prikkut linja) og føroyska útspælið (punkterað linja) Fetta linjan í Hetlandsrennuni er núverandi miðlinja (tvs. fiskimarkið) Kortið hevur DGU gjørt*

staðið við sítt. Men tá bretar sóu, at glið als ikki kundi koma á víðari samráðingarnar, hildu teir treytaleyst fast við sítt, gjørdu teir av at hála nakað í land, tvs. at teir fluttu kravið til markið eysturefur. Hvussu nógv vita vit ikki, líka so lítið sum vit vita, hvat føroyska samráðingarnevndin síðani hevur bjóðað bretum.

**Uriaspostur**
Nú Árni Olafson hevur staðið á odda fyri samráðingunum í meira enn eitt ár spurdu vit hann, um hetta starv hansara í veruleikanum ikki er at meta sum ein uriaspostur!

-Tað er tað. Sjálvandi trupult at hugsa sær, at ein kann koma til eitt úrslit, sum øll fegnast um. Eitt samráðingarúrslit er ein neyðloysn - eitt kompromi har ein er noyddur at viðurkenna, at øll eins ynski ikki vórðu gingin á møti. Alternativið er, at samráðingarnar enda uttan úrslit og at tað tí má verða farið til dómstólin við málinum. Tað fer so at taka eini 3-4 ár at bíða eftir einum dómi, og tá vita vit als ikki, um vit fáa eitt betri ella verri úrslit, enn tað vit fingu við samráðingunum.

**Haag**
Vit spurdu Árna Olafson, um tað kann hugsast, at tann parturin, sum ger av at gevast við samráðingunum og harvið fer til dómstólin við málinum, fer at standa veikari enn hin parturin í eini rættarsak!

-Tað trúgvi eg ikki. Tað er neyvan at umrøðandi hvør leggur eina sak. Kunnu báðir partar vísa dómstólinum, at teir hava gjørt sítt ítarsta og hava handlað í góðari trúgv og sett kompromisuppskot, so fer rættur in ikki gera mun á partunum, uttan mun til hvør fer í rættin við málinum.

Árni Olafson vísir í hesum viðfangi á, at tað vóru danir, sum fóru til Haag-dómstólin við Jan Mayen sakini, og úrslitið av henni kom so ikki at skaða donsku sakina nevnisvert.

-Eg haldi, at umrøddi Jan Mayendómur hevur avklárað nøkur ting hjá okkum eisini, so kunnu vit ikki út frá m.a. honum koma til eina semju við bretar, so er tað tí, at tað skortar vilji at fáa eina samráðingarloysn, og tá er dómstólurin einasta loysnin.



*ÁRni Olafsson og Halgir W. Poulsen her í Tinganesi eftir lokið samráðingarumfar við bretar. Mynd kalmar*

**Halgir W. Poulsen illa verast fyriuttan**
Tá føroyska samráðingarnevndin fer aftur til London at samráðast helst í februar verður ein av undangongumonnunum í nevndini ikki við. Tað er Halgir W. Poulsen, sakførari, sum hevur verið við í arbeiðinum hjá nevndini øll árini.

Hann tók seg herfyri úr nevndini, tí hann varð skuldsettur í tí stóra razziamálinum.

Árni Olafson og Halgir W. Poulsen hava havt sera gott samstarv øll hesi árini og Árni dylur ikki fyri, at fyri Føroyar og føroysk áhugamál er tað ein dyggur smeitur, at Halgir ikki er við í samráðingarnevndini.

-Halgir er ikki bert ein royndur og vitandi advokatur. Hann hevur eisini drúgvar royndir í øllum undirgrundarspurninginum frá tí at føroyingar fóru at tosa við danir um at yvirtaka undirgrundina. Har var hann so við frá byrjan til enda, tá tað eydnaðist føroyingum at sannføra danir um, at undirgrundin og møgulig ráevni í henni eru føroysk ogn.

-Vit kunnu sjálvandi fáa aðrar løgfrøðingar at hjálpa okkum, men tað verður so ongantíð tað sama sum at hava Halgir í nevndini - tá hugsað verður um drúgvu royndir og stóra innlit hansara.

-Eg haldi ikki eg sigi ov nógv, tá eg sigi, at í prinsippinum eru royndir og vitan hansara "óerstattulig" leggur Árni Olafson afturat.

Uppá fyrispurning um nevndin hevur fingið annað fólk í hansara stað sigur hann, at tað hevur hon ikki. Hann ynskir heldur ikki at upplýsa, um nevndin fer at fáa annað fólk og um hon fer at søkja sær útlendska ráðgeving, soleiðis sum onkur hevur víst á, at nevndin átti fyri harvið at tryggja Føroyum eitt gott úrslit. Fyribils er so ætlanin at hava fund við bretar í februar.

jan


# F.C. BUÐIN

**Undir Tórs-Cafeteria**
**Inngongd við gos-vatnið**

## CD-LISTIN

| | |
|---|---|
| 1. BARY MORE – Ballads and blues | kr. 195,- |
| 2. AEROSMITH – Big Ones | kr. 195,- |
| 3. MEGA MIX 2 – (40 Hits) | kr. 195,- |
| 4. STING – Best of... | kr. 195,- |
| 5. ANDREW LLOYD WEBBER – Very best of... | kr. 195,- |
| 6. LUTHER VANDROS – Songs | kr. 195,- |
| 7. BON JOVI – Crossroad | kr. 195,- |
| 8 FRANK SINATRA – Duets 2 | kr. 195,- |
| 9. Just can't get enough – dupult CD 80-ára hits BERT | kr. 195,- |
| 10. Now Dance Music of '94 – dupult CD | kr. 298,- |
| 11. More Dance Music nr. 2 | kr. 195,- |

*Ring 17646 – vit senda um alt landið!*

**Postboks 1250**
**FR 110 Tórshavn**
**Tlf. 17646 - Fax. 18401**

Opið er:
Mánadag–hósdag 10–17.30
Friggjadag 10–19.00
Leygardag 11–14.00